# Býráðið

**Dagfesting:** 30.10.2025 kl. 19:00
**Málnr.:** 25/00008

Nevndarlimir: Dávur Juul, Ólavur Larsen, Eivin Breiðaskarð, Sonni á Horni, Jóan Pauli Olsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen, Kristian Martin Petersen

Varalimir: Steinfinn Várlíð Jacobsen fyri Eyðun á Lakjuni

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til afgørelse** | | |
| 46/25 | 25/00207-7 | Innkalling av tiltakslimi fyri Eyðun á Lakjuni 30.10.2025 |
| 47/25 | 25/00022-8 | Broytingar í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu |
| 48/25 | 25/00475-1 | Eykajáttan september 2025 |
| 49/25 | 25/00318-11 | Fíggjarætlan fyri 2026 |
| 50/25 | 25/00079-12 | AVtala um nýtt øki til moldgoymslu í Gjógvarahaga |
| 51/25 | 25/00461-5 | Møgulig leiga av miðhæddini Toftagøta 1 til skrivstovur til kommunufyrisitingina |
| 52/25 | 25/00533-2 | Avtala við Nýrúm um tøkniliga og fyrisitingarliga ráðgeving á teknisku deild |
| **Referatsager** | | |
| | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Til afgørelse**

**46/25**
**25/00207-7 Innkalling av tiltakslimi fyri Eyðun á Lakjuni 30.10.2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.10.2025 | 46/25 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Býráðslimurin Eyðun á Lakjuni á lista B hevur boða frá at honum berst frá, at møta á býráðsfundinum 30. oktober 2025 og ynskir tiltakslim innkallaðan.<br><br>Tað liggur ikki fyri hjá trið valdu á lista B Linda Toftegaard, at møta á fundinum í kvøld.<br><br>Fjórð valdur á lista B við 34 atkvøðum er Steinfinn Várlíð Jacobsen er tí kallaður inn sum tiltakslimur fyri Eyðun á Lakjuni. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini – fyrst á fundinum gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Grundarlag | Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Kommunustýrislógin og kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu<br>Møgulig fylgiskjøl<br>• Gerdabók kommunuvalid 2024 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | n | n |
| | Umsitingarligar | n | n |
| Tilmæli | 30.10.2025 | | |
| Dagf | Mælt verður býráðnum til at taka undir við at formligu viðurskiftini fyri at Steinginn Várlíð Jacobsen tekur sæti fyri Eyðun á Lakjuni eru í lagi. | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 47/25
## 25/00022-8 Broytingar í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.08.2025 | 36/25 |
| 2 Býráðið | 30.10.2025 | 47/25 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Tá kommunustýrið varð skipað í januar 2025, varð frítíðarundirvísingin, sum vanliga er undir málsræði hjá mentamálanevndini, løgd undir málsræði hjá sosialu nevnd, vegna ógegni.<br><br>Støðan við hesum gegninum er nú broytt við tað, at limurin í mentamálanevndini, sum var leiðari fyri frítíðarundirvísingina hevur sagt seg úr og er farin frá hesum starvi.<br><br>Tí er viðkomandi at flyta frítíðarundirvísingina aftur undir málsræði hjá mentamálanevndini. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu skulu broytingar í hesari viðgerast á tveimum býráðsfundum við í minsta lagi 14 daga millumbilið. | | |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>• Kommunustýrisskipani fyri Fuglafjarðar kommunu<br>**Møgulig fylgiskjøl**<br>• Kommunustýrisskipan Fuglafjørður við broyting 28. auguast 2025 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | n | n |
| | Umsitingarligar | n | n |
| Tilmæli | Mælt verður til at býráðið við 1. viðgerð samtykkir, at flyta frítíðarundirvísingina frá sosialu nevnd til mentamálanevndina, nú gegni í nevndini nøktandi, hesum viðvíkjandi. | | |
| Dagf | 19. auguast 2025 | | |

4

**Býráðið 28. august 2025:**
Jastrid av Dalbø fór av fundinum.

Býráðið tók einmælt unndir við tilmælinum og sendir málið víðari til aðru viðgerð.

**Býráðið 30. oktober 2025:**
Jastrid av Dalbø fór av fundinum.

Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum undir aðru viðgerð.

5 ______

**48/25**
**25/00475-1 Eykajáttan september 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.09.2025 | 62/25 |
| 2 Býráðið | 25.09.2025 | 43/25 |
| 3 Býráðið | 30.10.2025 | 48/25 |

6

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini og Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Ein gjøgnumgongd av fíggjarstøðuni á ymisku rakstrarstøðunum vísir, at tað er tørvur á at tillaga játtanina fyri 2025, við eini eykajáttan.<br><br>Talan er um íalt 1.063 tkr. býtt á hesi rakstrarstøðini:<br><br>RS120: Felagsútreiðslur, kommunufyrisitingin, 200 tkr. vegna øktar licens og skeiðsútreiðslur.<br><br>RS130: kommunuskrivstovan, 300 tkr. vegna øktar útreiðslur til uttanhýsis ráðgeving í samband við at tað tók tíð at fáa mannað fíggjarleiðarastarvið og tí at tillagingarnar í starvsfólkahópinum tóku longri tíð at fáa fullan virknað enn ætlað var frammanundan.<br><br>RS532: Kunning um kommununa, 120 tkr. vegna, nakað dýrari prenting en mett, innlesing av bind 1(ljóðbók) og tiltak í samband við bókaframølguna.<br><br>RS540 Mentanarhúsið: 215 tkr., sum eru eyka útreiðslur í samband við leiðaraskifti.<br><br>RS390 Ung í arbeiði og tiltøk til børn: 158 tkr. har størst parturin er vegna stóra áhuganum hjá ungum at taka lut í «ung í arbeiði».<br><br>RS224 Kommunulæknin: 70 tkr. sum skyldast øktar útreiðslur við tað at lutfalsliga nógvir vikarar hava røkt tænastuna higartil í ár. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Tørvur er á eykajáttan á nøkrum rakstrarstøðum. Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin koma við uppskoti, sum skal viðgerast 2. ferðir á býráðsfundi við í minstalagi 14 daga millumbili. |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Kommunustýrislógin og kommunustýriskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu.<br>**Møgulig fylgiskjøl**<br>Eykajáttan øki 4 og 5<br>Umbøn um eykajáttan - øki 2 og 3<br>Rakstur til dato við fíggjarætlan 2025 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | J | N |
| | Umsitingarligar | N | N |
| Tilmæli | Mælt verður til at fíggjarnevndin tekur undir við eykajáttanini, at peningurin verður tikin av innistandandi og sendur hana til 1. viðgerð í býráðnum. | | |
| Dagf | 16.09.2025 | | |



**Fíggjarnevndin 18. september 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum.

**Býráðið 25. september 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og sendir málið víðari til 2. viðgerð.

**Býráðið 30. oktober 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við eykajáttanini undir 2. viðgerð.

**49/25**
**25/00318-11 Fíggjarætlan fyri 2026**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.10.2025 | 66/25 |
| 2 Býráðið | 30.10.2025 | 49/25 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini og Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Býráðið hevur í døgunum 23. og 24 oktober arbeitt við, at raðfesta hvussu peningurin skal nýtast í 2026 út frá teimum kørmum, sum vórðu samtyktir 25.09.2025 har rakstur áðrenn rentur og avsrkivingar varð ásettur til 90,5 mió. kr. og íløgurnar til 50 mió. kr.<br><br>Inntøkurnar við óbroyttum skattprosent 21,25% og óbroyttum frádráttum væntast at vera 129 mió. kr., samansettar av:<br>• Inntøkuskatti 88,5 mió. kr.<br>• Partafelagsskatti 17 mió. kr.<br>• Skattur av kapitaleftirlønum 21,2 mió kr<br>• DIS/FAS, veiðu- og tøkugjøld 2,7 mió kr.<br><br>Hetta merkir at fíggjarætlanin komandi ár hevur eitt gjaldførishall áðrenn rentur og avskrivingar uppá 11,5 mió. kr., sum má fíggjast við lántøku og/ella uppspardum peningi.<br><br>Í **rasktrinum** eru flestu rakstrarstøð framskrivað við umeið 4% á lønarsíðuni. Harafturat eru hesar raðfestingar gjørdar:<br>• Øki 1, kommunal fyrisiting: + 350 tkr. til integratiónsssamskipara og kunningarfólk<br>• Øki 3, Børn og ung: +250 tkr. til matarskipan á Barnalund og Stropanum<br>• Øki 5, Mentan- og frítíð: + 30 tkr. til ljóðføri í musikskúlanum, +75 tkr. til starvsfólkahjálp í Piddasahandli, + 150 tkr. til søvn/mentanararv, og + 20 tkr. hitapumpa til bátasavnið.<br>• Øki 6, Teknisk mál: +200 tkr. til fríðkan av kommunalum økjum.<br>• Øki 7, Kommunal virki: +100tkr. til umhvørvisplássið á Kambsdali, +84 tkr. til dagføring av tilbúgvingini og +200 tkr. til ferðavinnuætlan.<br>Á **løgusíðuni** eru hesar raðfestingar gjørdar fyri 2026:<br>• Øki 1, kommunal fyrisiting: +2,5 mió. kr., til miðbýarætlanina, heimasíðu, (skrivstovu) og uppstigingar. |

8

| | |
|---|---|
| | • Øki 2, Almanna- og heilsumál: +390 tkr. til barnatannrøktina og vesturstovu.<br>• Øki 3, Børn og ung: +250 tkr. til Kamb og Barnalund.<br>• Øki 4, Undirvísing: +30,3 mió. kr. harav 30 mió. kr. sambært avtalu um umvaling av 64-skúlanum<br>• Øki 5, Mentan- og frítíð: +5,8 mió kr. harav 5,0 mió. kr. til nýtt grasteppi á fóbóltsvøllinim, 600 tkr. til Høllina á Kambsdali og restin til smærri verkætlanir.<br>• Øki 6, Teknisk mál: + 8,55 mió kr. netto, harav 250 tkr. til plantulund á Kambsdali og ábøtur á svimjihilin í Skarðsá, 1,7 mió kr. til kikjugarðin í Fuglafirði, 500 tkr. til vatnveiting, 2,3 mió kr. til reinsiverk á Kambsdali, 1,0 mió. kr. til asfaltering við miðnámsskúlan á Kambsdali o.a og 2,4 mió. kr. til útstykkingar.<br>• Øki 7, Kommunal virki: +12 mió. kr. harav 10 mió. kr. til bryggju, sambært avtalu, 1. mió til íløgur á havnalagnum og 1 mió. kr. til vinnuøkið á Kambsdali. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært §38 stk. 2. í kommunustýrislógini skal kommunustýrið viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. |
| Grundarlag | Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt:<br>• Kommunustýrislógin og kommunustýrisskipan fyri Fuglafjarðar kommunu<br>Møgulig fylgiskjøl:<br>• |

Viðgerð

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | n | N |
| | Umsitingarligar | n | N |
| Tilmæli | Aftaná viðgerðina 23. og 24 oktober er raksturin 94,2 mió kr. ella 3,6 mió kr. hægri enn samtykti rakstrarkarmurin. Í løgurnar eru 60,1 mió. kr. ella 10,1 mió. kr. hægri samtykti karmurin.<br><br>Fíggjarnevndin verður tí biðin um at taka støðu til um rakstur og íløgur skulu skerjast í mun til fyriliggjandi uppskot ella at karmurin skal justerast.<br><br>Harafturat skal fíggjarnevndi taka støðu til, skattaprosent, frádráttir og inntøkumetingarnar annars, áðrenn málið verður sent byráðnum til 1. viðgerð. | | |
| Dagf | 26.10.2025 | | |

9

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2025:**
Fíggjanevndin mælir til at tað verða sett 25 mió. kr. av til skúlaumbyggingina í 2026 og at 5 mió. kr. verða sett av í 2027. Harafturat verða allar nevndirnar bidnar um at spara 150 tkr. í rakstrinum á økjunum 1 til 7. Fíggjarnevndin mælir harafturat til at skattaprosent og frádráttir verða óbroyttir komandi ár.

**Býráðið 30. oktober 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum og sendir málið víðari til aðru viðgerð.

10

Fundurin lokin kl. 21.15

Dávur Juul

Ólavur Larsen

Steinfinn Várlíð Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Sonni á Horni

18

Jóan Pauli Olsen

Jastrid á Dalbø

Ørvar Jacobsen

Kristian Martin Petersen